# andi fyri at eldur kom í bátin



*Soleiðis sá út, tá ið vindurin minkaði, og sjógvurin slætnaði. Her eru feðgarnir, Jógvan og Kjartan Mørkøre saman við triðja bátsfelaga í tungum sjógvi*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Í felagshúsinum í Ulsta á Yell hugnaðu vit okkum við sangi og guitarspæli*

Mynd: Vilmund Jacobsen



*Bátar liggja í Ulsta og bíða eftir líkindum at fara undir heimferðina*

Mynd: Anfinn Norðfoss

stevndu vestur í hav.

Menn hildu, at tað rak suður við landinum, samstundis sum lotið, ið eftir var, lá norðuryvir.

Tað var tvassut, nú tað fór at skýma og sambært bátunum, sum vóru farnir undan okkum og vóru nakrar fjórðingar longu frammi, vóru eingi útlit til, at veðrið batnaði vestureftir.

Teir søgdu seg hava minkað uppaftur meira um ferðina…

Var náttin á ferðini niður til Hetlands tvassut, var sjógvurin munandi verri teir fyrstu mongu fjórðingarnar vestureftir.

Eftir at hava siglt einar 10-12 fjórðingar, avgjørdi onkur bátur at venda aftur, men um sama mundið, sum hendan avgerðin varð tikin, frættist, at nú høvdu teir, sum undan okkum vóru farnir, frægari veður.

Veðrið hesa náttina var skiftandi. Viðhvørt var líkt til, at sjógvurin gjørdist sléttari, men so sigldi tú teg aftur í tvassut veður… og soleiðis gekk náttin og morgunin, sum stundaði til.

Meginpartin av náttini og degnum eftir høvdu vit vindin inn á stýriborðsbógv. Tað bukaði hart viðhvørt, og menn troyttaðust.

Sum dagurin eftir leið, gekk hann meira vestur á, soleiðis, at vit fyrst høvdu vindin beint framman, til hann "datt" yvir á bakborðsbógv.

Eg minnist ikki, nær sjógvurin rættiliga slætnaði, men tað tók drúgva tíð. Meti, at teir fyrstu hundrað fjórðingarnir vóru tvassutir hjá hesum smáu bátum. Hinvegin vóru teir seinastu 70 fjórðingarnir á eini leið - og síðan teir seinastu fimti hampiliga góðir.

Tá ið vit sóu Føroyar aftur, høvdu vit gott veður, og veðrið helt sær, til vit bundu bátarnar undir Havnarskrivstovuni, har bátarnir skuldu tollavgreiðast, áðrenn vit sluppu til húsar at leggja okkum í okkara egnu song aftur…

## Hendingar ávegis

Týdningurin av, at bátar fylgjast á slíkari ferð, er stórur. Hetta sóu vit bæði á burturferðini og heimferðini.

Ávegis til Hetlands mistu tveir bátar av seks, sum vóru í fylgi, streymin og mistu harvið bæði kortplottara og WHF'in. Eftir var bara kumpassin. Høvdu bátarnir havt el-drivna oljupumpu, sum nógvir dieselbilar hava, lógu teir sum "lorturin", sum onkur tók til.

Á heimferðini boðaði ein bátur um WHF'in knappiliga frá, at teir høvdu sjógv í maskinrúminum.

Allir fimm bátarnir vendu aftur beinanvegin og vóru hjá bátinum eftir fáum minuttum. Tá høvdu teir lensað sjógvin úr maskinrúminum við tveimum pumpum og kundu soleiðis síggja, at ein slanguklemma var farin. Tá ið klemman var skift, var alt í lagi aftur, og ferðin helt fram.

Hjá okkum fór eitt oljurør at leka, tá ið vit vóru einar 30 fjórðingar úr landi. Hetta var eitt spíss-rør, sum ikki fekst tætt aftur. Oljan fýsti úr rørinum, so oljuroykurin stóð ramur um allan bátin – allan teinin, sum eftir var til lands. Einastu, vit kundu gera, var at vinda ein klút um rørið soleiðis, at oljan ikki fór um alt maskinrúmið. Høvdu vit havt eitt góðan gummihandska, hevði hetta bøtt munandi um støðuna, men tað høvdu vit ikki.

Tað er ikki gamansleikur, tá ið eitt rør til brennioljuna fer. Oljan rennur niðureftir motorinum og kemur hon at forgreiningunum til útstoytið, kann skjótt eldur koma í bátin. Í okkara føri rann oljan úr klútinum og niður eftir motorinum, men lukkutíð stóðst ikki skaði av hesum.

## Í vestarnar

Vit lótu okkum í bjargingarvestarnar fyri at tryggja okkum, at aðrir siglarar fingu fatur á okkum, um eldur kom í bátin, og vit noyddust at leypa í havið.

Til tess at tryggja mær, at telda og myndir ikki endaðu í havinum, um ringast vildi til, pakkaði eg telduna í lugarinum og setti hana aftast í bátinum.

Ungi sjógarpurin, Magni, sum var við okkum á ferðini, var vorðin eitt sindur ótryggur við umstøðurnar og hevði hug at sleppa í annað bát. Um WHF'in róptu vit á bátin, Hera úr Kollafirði, sum tók 13 ára gamla dreingin umborð á opnum havi.

Hetta gekk eftir bókini…

Vit loysti úr Ulsta hóskvøldið um 18-tíðina, og vit løgdu at undir Havnarskrivstovuni í Havn um 01.30-tíðina leygarmorgunin.

Ein góð og hendingarrík ævintýrferð var at enda komin.

Við hesum er sjálv ferðafrásøgnin liðug, men Sosialurin, sum var við í bátaferðini í Hetlandi, hevur onkra aðra grein í skjáttuni, sum vit fara at venda aftur til.




*Og her er so báturin, Ethel, sum vit vóru við í Hetlandi. Opin bátur við presending sum verju*

Mynd: Vilmund Jacobsen